# Besta boðið

JÓGVAN Á LAKJUNI
*landsstýrismaður og valevni Fólkafloksins*

Vit kunnu vera ósamd um nógv. Men tá ið vit seta okkara umstøður í perspektiv og samanbera tær við ta neyð og elendigheit og tann harðskap, sum er mangastaðni í heiminum, so hava vit føroyingar tað ómetaliga gott – og í tí ljósinum fær mangt av tí, sum vit kjakast um í einum valstríði, eitt annað skin.

Men her skal stýrast, og sjálvandi ger tað ikki tað sama, hvussu stýrt verður, og hvørja politiska skipan, vit hava!

Vit í Fólkaflokkinum bjóða okkum fram og halda sjálvandi, at vit hava besta boðið upp á hetta!

Í bókini, »Men lívið lær«, lýsir Heðin Brú tað klassabýtta føroyska samfelagið síðst í átjandu øld, har lógirnar bundu fólkið niður. Høvuðspersónurin í bókini er ein kvinna, Durita, og hon verður lýst sum ein hetja, ið við sínum virkisfýsni fær endurreist stórar partar av bygdini og meira aftrat, tí hon situr ikki og ivast í hvussu og hvat, men uttan at drála ger hon tað, hon veit, er rætt – og hon berjist fyri, at føroyingurin skal fáa mannarættindi í egnum landi.

Í hesi bókini lýsir Heðin Brú, hvussu stóran týdning kvinnan altíð hevur havt í tí føroyska samfelagnum, men eisini hvussu ómetaligan týdning bara eitt menniskja kann hava fyri sítt umhvørvi og sítt land.

Og vit vita øll, hvussu týdningarmikið tað er, at fólk, sum hava hugsjónir, vilja og áræði – tað veri seg í vinnulívi, innan mentan ella ítrótt – sleppa framat at virka, og tað er so týdningarmikið, at vit, sum bjóða okkum fram sum politikarar, gera alt fyri at skapa karmar, soleiðis at tey fólkini, sum vilja nakað, sleppa framat at virka.

Hesum politikki stendur Fólkaflokkurin fyri. Vit vilja, at tann einstaki borgarin skal hava frælsi til sjálvur at leggja egin viðurskifti til rættis eftir evnum, vilja og undir ábyrgd fyri sær sjálvum og sínum.

Men samstundis er tað so týðandi, at vit ikki gloyma tey, sum ikki eru ment at klára seg sjálv í samfelagnum – tey menningartarnaðu, tey rørslutarnaðu og onnur, sum bera brek. Her hava vit sum politikarar eina av okkara størstu skyldum: at taka okkum av okkara veikastu borgarum og hjálpa foreldrum og familju, sum ofta sita so einsamøll við trupulleikunum.



# Menningin av skúlaverkinum



KRISTINA BERG
*Tjóðveldi*

Í einum altjóðagjørdum heimi, har fólk so væl sum vørur og framleiðsla flyta ímillum lond, alt eftir hvar tað er mest áhugavert ella gevandi at vera, eru krøvini stór til, hvat eitt land hevur at bjóða tí einstaka.

Framleiðslu-, tøkni- og tænastuvinnur leita til tey støð, har tey fáa sum mest burturúr íløgunum. Lønarlagið í Føroyum er ov høgt til, at vit eru áhugaverd fyri hópframleiðslu av ymsum slag, og tað eru helst fá, ið eru áhugaði í einari lægri miðalløn í Føroyum. Tí verður í einum framtíðar fríum Føroyum alneyðugt at hava vitandi fólk til serframleiðslu, tøkni og ymsar tænastur.

Vit mugu leggja dent á lærdóm og vitan, á evnini at greina og lýsa og á sjálvstøðuga hugsan. Fremsta uppgávan hjá skúlanum er at birta uppundir áhugan hjá børnum fyri ymiskum fyribrigdum og at finna sær fram vitan.

### Bæði næmingar og lærarar

Vit mugu tískil menna føroyska skúlaverkið frá fyrsta skúladegi til Fróðskaparsetrið. Vit mugu tryggja okkum, at fólkaskúlin hevur neyðugu fíggjarligu og rúmligu karmarnar til at bjóða fram mennandi skúlagongd fyri allar næmingar.

Men vit mugu eisini tryggja eitt gott, áhugavert og mennandi arbeiðsumhvørvi fyri lærararnar, har hesir trívast og ynskja at vera verandi heldur enn at ynskja seg burtur til eitt annað, betri lønt starv t.d. í privatu vinnuni.

Trivnaðurin skal vera í hásæti, bæði fyri lærarar og næmingar.

Happing eigur ongantíð vera góðtikin, men manglandi áhugi fyri skúlanum eigur at vera átalaður, bæði tá tað snýr seg um lærarar og næmingar.

Grundarlagið hjá teimum einstøku næminginum, tá tey er liðug við fólkaskúlan, eigur at vera so gott, at tey uttan stórvegis trupulleikar kunnu fara víðari á miðnámsskúla, um áhugi er fyri tí, antin í Føroyum ella uttanlands.

Okkara næmingar mugu kunnu standa seg í kappingini við næmingar úr øðrum framkomnum londum. Ein og hvør næmingur eigur at hava møguleika at velja sær eina víðari leið eftir egnum áhuga, innan handil, list, tónleik, tekniska útbúgving ella studentaskúla, umframt víðari lestur av ymsum slag.

Førleikan til hetta valið eigur næmingurin at hava fingið í føroyska fólkaskúlanum. Men eisini miðnámsskúlarnir í Føroyum mugu kunna standa seg í kapping við aðrar miðnámsskúlar, eins og Læraraskúlin og Fróðskaparsetrið skulu vera kappingarfør.

Hesir útbúgvingarstovnar mugu hava góðar karmar at virka undir og eina nútíðarhóskandi undirvísingarætlan, sum bæði byggir á altjóða krøv, men eisini á tað, sum er serstakt her á landi.

### Vinnan og skúlin

Eisini vinnan hevur áhuga í og fær ágóðan av einum væl útbúnum fólki. Tí skal vinnan eisini vera virkin við at vera opin fyri, at næmingar á ymsum skúlum og ymsum skúlastigum kunnu hava møguleika fyri í eitt styttri ella longri tíðarskeið at arbeiða aftaná skúlatíð ella sum liður í útbúgvingini, í starvsvenjing ella í tíðaravmarkaðum verkætlanum.

Næmingar, sum hava royndir innan ymsar vinnugreinar, hava størri møguleika fyri at velja ta røttu útbúgvingina og kunnu skapa sær eitt týdningarmikið netverk at byggja eina víðari yrkisleið á.

Um lesandi uttanlands hava góða kontakt við arbeiðspláss í Føroyum, er áhugin størri fyri at venda heim aftur og harvið geva nýggjan íblástur uttanífrá.

Framburður er ikki nakað, ið kemur av sær sjálvum, men er nakað, vit sjálvi skapa við miðvísum íløgum, framskygdari hugsan, skapanaráhuga og nýhugsan. Hetta eru eisini lyklaorð í tí nógv nýtta hugtakinum íverksetan. Íverksetanarmentanin í Føroyum má mennast, og hetta kunnu bæði vinnan og skúlaverkið stuðla undir við at eggja til skapanarhuga og nýhugsan.

Tjóðveldi vil arbeiða fyri, at føroyska skúlaverkið alt livir upp til altjóða, nútímans krøv við virðing fyri til einstaka og umhugsan fyri fjøldini, og vit stuðla tí ríka skapandi virkseminum, sum vit hava her á landi. Hervið styrkja vit um okkara samleika og støðu sum serstøk tjóð úti í heimi.

*Við tjóðveldiskvøðu,*
*Kristina Berg,*
*Handilsskúla- og Studentaskúlalærari,*
*Fuglafjørður*